Verkætlanin hevur sum fortreyt, at bygningurin á økinum verður tikin niður. Vatnmeistarin hevur upplýst, at einki virksemi hevur verið í bygninginum, síðani vatnverkið varð flutt. Gøtuljósdeildin brúkar partar av bygninginum til goymslu, hetta hóast hann liggur nakað avsíðis. Avrátt er, at Gøtuljósdeildin flytir tilfar úr bygninginum, í góðari tíð áðrenn niðurtøku av bygninginum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Býararkitekturin og deildarleiðarin á Bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við ætlaðu staðsetingini av nýggjum Frítíðarskúla í Kollafirði, at onnur staðseting til virksemið hjá Gøtuljósdeildini verður funnið, tá byggingin fer í gongd, og at beina málið til kollafjarðarnevndina umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at tekna og byggja nýggjan frítíðarskúla í Kollafirði er bjóðað út og tilboð komin inn frá Articon, Búsetur og HVT. Uppskotini eru mett og dømd út frá krøvum til góðsku í bygningi, funktión og kostnaði. Í dømingini hevur kostnaður vigað 40%.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini og uppskotunum, umframt niðurstøðuni hjá dómsnevndini, har tað er uppskotið hjá Articon, sum mett er tað besta, tó at tað ikki er tað bíligasta. Kostnaðarmeting fyri hetta uppskotið umframt byggiharraútreiðslur, mvg o.a. liggur sum hjálagt skjal.

Fígging er ikki tøk til at seta byggingina í gongd. Tilgongdin víðari má taka hædd fyri, nær hugsast kann, at byggingin kann byrja. Skotið verður upp, at samráðst verður um vinnandi uppskotið, harímillum tíðarætlan, sum tekur atlit at fíggingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at heimila umsitingini at samráðast við Articon um arbeiðstøkusáttmála, og koma aftur í nevndina við yvirliti yvir fíggjartørv í 2024 og 2025.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, ynskir at viðgera málið til nærri støðutakan á seinni fundi.

Ein minniluti, Annika Olsen og Súsanna Olsen, tekur undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2023:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 01. november 2023**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í eini tilgongd saman við ArtiCon og samrátt um møguliga arbeiðstøkusáttmála.

Í mun til hini tilboðini, høvdu ArtiCon í tilboðnum, sett munandi meira av til útiøkið. Talan var um eitt fullfíggjað spælipláss við allari útgerð. Harumframt breiddi parkeringsplássið seg inn á økið hjá KURA, sum gjørdi annlegs arbeiði nakað størri enn neyðugt. Sí skjal *"Støðumynd 1&2"* ið vísir støðumyndina úr tilboðnum og nýggja støðumynd.

Í samráð við umsitingina, hevur ArtiCon framleitt nýggja støðumynd har spæliútgerðina er tikin úr, og P-plássið er minkað í tí síðuni, sum vendir mótir KURA. Skotið verður upp at gera tvey P-pláss móti Zion. Neyðugt verður samstundis at arbeiða við umskipan av markinum millum Zion og Frítíðarskúlan.

Í samráðingunum um sáttmála hevur prosjekteringskostnaðurin eisini verði til viðgerðar. ArtiCon kann spara nakað í prosjekteringsleiðslu og prosjektuppfylging.

Samanlagt er nú lagt upp til ein arbeiðstøkusáttmála á **16.685.379,24** móti 18.695.345,09 sum tilboðið ljóðaði. Sí skjal *"Samanber tilboð 1&2"* Samanborið við hini tilboðini er útreiðslan til "Jørð og Lendisarbeiði" nú meira lík. Samanlagt er tilboðið hjá ArtiCon miðskeiðis millum hini tilboðini, bæði í mun til arbeiðstøkuupphæddina og krónur pr. fermetur.

Sí eisini skjal *"samlað kostnaðarmeting dagf. 08.02.2024"* Viðmerkjast skal, at nú er spæliplássið ikki við í kostnaðarmetingini, og tí verður neyðugt at taka fígging av útiøkinum upp í aðrari málsgongd.

Í samráðingunum var tíðar- og gjaldsætlan er eisini viðgjørd. Undirskriving av sáttmála er sett at verða í mars mánaði. Síðani halda fyrireikingarnar fram, og høvuðsprosjektið, verður tøkt í oktober mánaði 2024. Samstundis verður byrjar við niðurtøku av bygningi á økinum. Eftir tíðarætlanini verður nýggi frítíðarskúlin handaður í desember mánaði í 2025 Sí skjal *"Tíðar- og gjaldsætlan"*

Til verkætlanina eru tøkar kr. 3.578.391. Restfígging er sostatt kr. 13.106.988,24, sum verður at fíggja í fíggjarætlanini 2025.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at heimila umsitingin, at gera sáttmála um heildararbeiðstøku við ArtiCon, sambært omanfyristandandi kostnaði.

Harumframt verður mælt til, at arbeiðið byrjar í oktober 2024. Mælt verður somuleiðis til at játta kr. 3.578.391 av løgukarmi 3175 LK31014 til løgukontu L31014 Nýggj høli til frítíðarskúlan í Kollafirði, og at játtaðar verða kr. 13.107.000 í fíggjarætlanini 2025.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Eisini samtykti nevndin at geva umsitingini heimild at samráðast um ískoytisáttmála við Articon um útiøkið og koma aftur í nevnd til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høvuðssáttmáli er undirskrivaður 21.05.2024, sí viðfesta skjal. Sum avrátt, er samrátt um ískoytisavtalu, upphæddin er 2.009.966,00, sí viðfesta skjal. Samlaði verkætlanarkostnaðurin verður við kommunalum mvg 23.343.925,00, sí viðfesta skjal

Restfígging í 2025 verður sostatt 19.765.534,00

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at heimila umsitingini at gera ískoytisavtalu um lendisarbeiði við Articon áljóðandi 2.009.966,00 og at restfígging 19.765.534,00 verða játtaðar í fíggjarætlanini 2025

**Mentamálanevndin 05. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálaevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1058<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 245/24 Gøtunøvn til nýggju útstykkingina omanfyri Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 05.07.2024 | 1/24 | 24/03443-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2024 | 159/24 | 24/03443-3 |
| 3 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 245/24 | 24/03443-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan á Gøtunavnanevndina at koma við tilmælum um gøtunøvn.

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting heitir á Gøtunavnanevndina at koma við tilmælum um gøtunøvn í útstykkingini omanfyri Argjahamri.

Tekniska umsiting hevur sent inn tilfarið um økið, og liggur tað í málinum sum skjal 24/03443-1

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/03443-1 – Tilfar frá Teknisku umsiting.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 05. juli 2024:** Nevndin mælir til, at útstykkingin oman fyri Argjahamar fær navnið «Elspugøta» eftir Elspu Dánjalsdóttur konu Andras Mortansson. Tey vóru fyrstu niðursetufólk á Argjum.

Í sambandi við útstykkingina sunnan fyri Argjahamar mælir nevndin til at nevna ovaru gøtuna «við Ljósá» og bogan og niðaru gøtuna «við Fransá»

Hetta er við støði í, at ovari partur av ánni frá Ljósávatni eitur Ljósá, og niðari partur eitur Fransá.

**Mentamálanevndin 11. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

## 246/24 Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 19/23 | 23/03547-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 191/23 | 23/03547-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 147/23 | 23/03547-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 186/23 | 23/03547-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 28.11.2023 | 29/23 | 23/03547-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 338/23 | 23/03547-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.12.2023 | 361/23 | 23/03547-1 |
| 8 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 325/23 | 23/03547-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 11/24 | 23/03547-1 |
| 10 Heilsu- og eldranevndin | 08.10.2024 | 22/24 | 23/03547-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 239/24 | 23/03547-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 246/24 | 23/03547-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Lágargarður sum var sjálvsognarstovnur til kommunan yvirtók eldraøki í 2015 er 36 ára gamal. Lágargarður treingir til at umvælast og nakað er gjørt seinnu árini. Serliga køkurin treingir til eina høvuðsumvæling um hann framhaldandi skal kunna virka. Nakað av útbúnaðinum í køkinum er skift út seinnu árini, tí útbúnaðurin antin gekk fyri ella var í so ringum standi at trupult var at brúka hann.

Køkurin á Lágargarði ger umframt allan mat til teir 48 borgararnar sum búgva har, eisini mat til búfólkini á Tjarnargarði í eru 41 í tali.

Eisini ger køkurin døgurða til teir áleið 30 borgararnar sum dagliga koma í virkis- og venjingarstovuna á Lágargarði umframt at matartænastan er staðsett í køkinum á Lágargarði. Tað verða í køkinum á Lágargarði gjørdir døgurðar til áleið 110 heimabúgvandi borgarar, sum svarar til áleið 460 døgurða og 421 dessertir um vikuna til heimabúgvandi borgarar.

Tað er ikki longur gjørligt at økja um kapasitetin í køkinum. Sannlíkt er at matartænastan bara økist, sum tað gerast fleiri og fleiri eldri borgarar. Ætlanin er tí, at tá nýggja røktarheimi á Stórubrekku sum arbeitt verður við í løtuni er liðugt, verður matartænastan flutt av Lágargarði til køkin á nýggja røktarheiminum. Sostatt er tað sum so, ikki tørvur á at útbyggja køkin á Lágargarði, men alneyðugt at høvuðsumvæla køkin, eisini so at hann lýkur tey krøv sum verða sett til stórkøkar av hesum slag.
Sí støðulýsing frá bygningsdeildini

Tað er alneyðugt at fari verður undir at høvuðsumvæla/nýbyggja køkin á Lágargarið sum skjótast, men fyrst má arbeiði projekterast so ein neyv ætlan og kostnaðarmeting fyriliggur, soleiðis at fígging kann fáast til vega og arbeiði bjóðast út.

Bygningsdeildin metir at projekteringsarbeiðið kostar áleið 700.000 kr. men hevur ikki pening tøkan til hetta arbeiðið. Heilsu- og umsorganartænastan hevði eina minninýtslu í 2022 og tí er møguligt sum eykajáttan at flyta 700.000 kr. av konto 2722 Tilboð til konto 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at peningur er tøkur til projekteringsarbeiðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á bygningsdeildini og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla Heilsu- og eldranevndini til, sum eykajáttan at flyta 700.000 kr av 2722 -Tilboð á 6110 Umsiting og røkt av bygningum til projektering av høvuðsumvæling ella nýbygging av køkinum á Lágargarði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 21. juni 2023: Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
<u>Prosjekteringsarbeiði.</u>
Sambært býráðssamtyktini, setti Bygningsdeildin prosjekteringsarbeiði í gongd. Útgangsstøðið er støðulýsingini (sum var løgd fyri nevndina hin 19 juni)

Projekteringsarbeiði er nú komi fram at lidnum prosjektuppskoti. Sostatt eru neyvari tekningar og tilhoyrandi kostnaðarmetingar tøk til kunning. Sí hjáløgdu skjøl um prosjektuppskot.

Prosjektuppskotið er gjørt av ráðgevarum innan HVS, EL, konstruktión, byggifrøði, arkitektur og prosjektleiðslu. Ráðførsla við brúkarar hevur verði við deildarleiðaran fyri køkarnar í H&U og køksleiðaran á Lágargarði. Harumframt hevur samráð verði við Heilsufrøðiligu starvstovuna um køksinnræting, reinførisreglur og mannagongdir (Flow)

Í mun til málslýsingina, ið var løgd fyri nevndina hin 19 juni, eru fortreytirnar broyttar soleiðis at matartænastan, ístaðin fyri at flyta í nýggja røktarheimið á Stórubrekku, framhaldandi skal verða partur av køkinum á Lágagarði.

<u>Stutt um matartænastuna</u>
Matartænasta byrjaði á Lágargarði í kreppuni í 1993, og kom við, tá kommunan yvirtók eldraøkið frá landinum. Talið av brúkarum og veitingum hevur verði rættuliga støðugt, seinastu fimm árini, og liggur í dag um 100 brúkarar sum fáa áleið 17 veitingar um mánaðin, te. Tilsamans áleið 1700 veitingar um mánaðin. Ein varislig 10- ára framrokning av tænastuni, vísir ein støðugan vøkstur til umleið 2700 veitingar í 2033

<u>Høvuðsumvæling og umbygging</u>
Í støðulýsingini var víst á tørvin, at flyta frystigoymsluna úr garasjuni og heldur gera frystirúm sum part av køkinum. Avbjóðingin gjørdist tí, at finna røttu staðsetingina í mun til flow og kapasitet. Reinførisreglurnar mæla frá at staðseta frystirúmið fyri endan av framleiðslu flowinum, sum støðulysingin annars legði upp til. Í prosjektuppskotium eru tí í staðin gjørd pakkihølir og nýggjur durur til matartænastuna fyri endan av framleiðslu flowinum (partur av matstovuni) sí tekningar í prosjektuppskotinum.

Neyðugt er eisini at gera nýggja ventilatiónsskipan. Prosjektuppskotið leggur upp til at gera nýtt tøknirúm omanfyri verandi ventilatiónsrúm. Hetta ger samstundis, at pláss verður fyri nýggjum frysti- og tini rúmi har ventilatiónsrúmi var. Við hesi loysnini verður betra munandi um flow og mannagongdir í mun til reinføri, eins og køli- og frystikapasitetur verður framtíðartryggjaður.

Fyri at fylgja reglum um arbeiðsumhvørvið leggur prosjektuppskotið upp til at gera nýggj wc- og skiftingarrúm, sum skulu verða burturav til starvsfólkini í køkinum.

Fyri at betra um arbeiðsgongdir verður uppvaskirúmið víðka munandi, so pláss eisini verður fyri at vaska vognar og onnur stór ting.

Við prosjekuppskotium verður køkurin umleið ein triðing størri, íroknað eyka hædd til tøknirúm. Víðkanin er 80 fermetrum úr núverandi 244 upp í 324 fermetrar. Kostnaðurin av prosjektuppskotinum verður tí eisini munandi hægri enn upprunaliga metingin. Sí skjal: *«kostnaðarmeting prosjekt uppskot»*

Saman við fyrisitingini í H&U hevur Bygningsdeildin fingið til vega eitt alternativt uppskot til innrætting, har víðkanin ikki er eins stór. Í hesum uppskotinum verður ventilatiónsrúmi ikki flutt og uppvaskirúmið verður somu stødd sum verandi. Býtt verður um uppá staðseting av ávíkavist køli-, svali og frystirúm, og hesi rúm verða samstundis tilsamans minkað úr 45 fermetrum, niður í 26 fermetrar.

Hóast minni rúmshátt, verður framvegis hildið verður fast í meginreglunum um flow og reglur um reinføri og arbeiðsumhvørvi. Við hesum uppskotinum verður víðkanin umleið 40 fermetrar og kostnaðurin samsvarandi lægri   Sí skjal: *«kostnaðarmeting prosjekt uppskot 2»*

<u>Endurhýsing í skúlanum á Fløtum</u>
Í prosjekteringstilgongdini er uppskot frammi, um at flyta alt virksemi úr køkinum á Lágargarði í køkin í Skúlanum á Fløtum í byggitíðini. Køksstarvsfólkini hava kannað viðurskiftini, og niðurstøðan er, at hetta letur seg gera uttan stórvegis tillagingar. Tó má roknast við at einstøk flytbar tól mugu takast við úr Lágargarði ella leigast. Í byggitíðini skal maturin sostatt koyrast av skúlanum til bæði Tjarnargarð og Lágargarð, umframt at  matartænastan skal virka sum nú.

Skúlaleiðslan á Skúlanum á Fløtum, er kunnað um ætlanina at brúka køkin. Hetta skal tó endaliga staðfestast í samráð við Mentamáladeildina. Í kostnaðarmetingini, sum er partur av prosjektuppskotinum, er hædd tikin fyri kostnaðinum av endurhýsing.

Sí fylgiskjal við kostnaðarmeting.

<u>Fígging</u>

Fíggjartørvurin í 2024, kann játtast sum eykajáttan millum rakstur og íløgur av væntaðari minninýtslu í 2023 á deildunum 2721 Røktartænastur og 2722 Tilboð.
Av teimum fyrr játtaðu 700.000 kr. til projekteringsarbeiði eru 236.000 kr. brúktar íroknað netto mvg.
Mælt verður til at restupphæddin á 464.000 kr somuleiðis verður flutt á verkætlanina.

Játtast av:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2721 | Røktartænastur | 2.700.000 kr. | (2721 - 741012) |
| 2722 | Tilboð | 1.300.000 kr. | (2722 - 741012) |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 464.000 kr. | (6110 - 61112 - 741012) |
| | Í alt | 4.464.000 kr. | |

Játtast á:
2775 Eldrarøkt (íløgur)
Nýggj verkætlan: 2775 - L270xx (Lágargarður, høvuðsumvæling køkur)

Fíggjartørvurin í 2025 má játtast, sum partur av íløguætlanini fyri 2025.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1064 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 2721<br>2722<br>6110 | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 2775 | | Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði | L270xx |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 16.364.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 / 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til, sum eykajáttan í 2024, at flyta kr. 4.464.000 til nýggja verkætlan nevnd; "Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði", og geva heimild til at niðurríva verandi køk, og bjóða verkætlanina út á sumri í 2024. Komið verður aftur í nevndina, í sambandi við fíggjartørvin í 2025.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 28. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
**<u>Støðan í septembur 2024</u>**
Starvsfólk í køkinum á Lágargarði eru flutt, og farin í køkin í Skúlanum á Fløtum. Køkurin í skúlanum, vísir seg at verða ein hampiliga fyribils loysn, sum nú hevur virka síðani apríl mánað í ár.

Tilgjørdur matur verður pakkaður og koyrdur til Lágargarð, Tjarnargarð, eins og til borgarar, sum brúka tilboðið hjá matartænastuni. Starvsfólkini vísa á, at køkurin í skúlanum er trongur, serliga í mun til tilgerð av heitum mati. Køli- og frysti kapasiteturin er lítil, eins og ferðslan av vørum og útkoyring í skúlatíðini, er eitt sindur trupul. Køksleiðarin hevur onga skrivstovu í skúlanum, og heldur onki starvsfólkarúm er tøkt. Hendan loysnin ber tí bert til, við góðum vilja, í nakrar mánaðir afturat.

Verandi køkur á Lágargarði er tikin niður, flísagólv og bjálving er tikið oman av betonggólvinum. Loft veggir og ventilatión er niðurtikið, og alt tað, sum ikki kann endurnýtast er beint burtur. Timbursúlur, sum vóru rotnar niðri við gólvið, eru skiftar til nýggjar stálsúlur. Ein høvuðssúla úr stáli, verður umvæld, tí hon

er illa tærd undir flísunum. Sostatt verða allir berandi lutir tryggjaðir, áðrenn byrjað verður at byggja upp aftur.

**<u>Prosjektering og tilboð</u>**
Detalju prosjektið var liðugt í juli mánaði, og arbeiðið er boðið út í trimum pørtum.

1) Uppbyggjan av køkinum
2) Køli- og frystirúm til køkin
3) Útbúnaður til køkin

Øll tilboðini vóru latin upp hin 09. Septembur 2024. Niðanfyri síggjast talvur við til-boðunum.

1) Uppbyggjan av køkinum

| **Uppbyggjan av køkinum á Lágargarði:** | | | |
|---|---|---|---|
| *Arbeiðstakari* | *Tilboð uttan MVG* | *Ræðfylgja* | |
| **ÁTS** | **4.845.255,00 kr** | **1** | |
| BE Smíð | 6.618.987,66 kr | 4 | |
| Búsetur | 6.187.173,00 kr | 2 | |
| Valaverk | 6.353.125,08 kr | 3 | |

ÁTS vóru lægstir, og tilboðið er kannað. Mælt verður til at gera sáttmála við ÁTS áljóðandi tilboðsupphæddina, íroknað smávegis rættingar og tilkeyp.

2) Køli- og frystirúm

| **Køli- og frystirúm til køkin á Lágargarði:** | | | |
|---|---|---|---|
| *Arbeiðstakari* | *Tilboð uttan MVG* | *Ræðfylgja* | *Køliveska* |
| Frost | 786.337,00 kr | 3 | Freon R407F |
| **Frost** | **959.887,00 kr** | **1** | **$Co^2$** |
| Leif Mohr | 1.239.063,00 kr | 2 | $Co^2$ |

Frost lat tvey tilboð inn. Mælt verður til at gera sáttmála við FROST um køli- og frystirúm við við Co2 kølivesku. Co2 er meira umhvørvisvinarlig og orkusparandi enn Freon. Sáttmálin verður áljóðandi tilboðsupphæddina. Ein upphædd er løgd afturat í metingini, til íbinding, tilsamans 1.151.864.

3) Útbúnaður

| **Útbúnaður til køkin á Lágargarði:** | | | |
|---|---|---|---|
| *Arbeiðstakari* | *Tilboð uttan MVG* | *Ræðfylgja* | *Karakter* |
| Elding | 2.585.403,89 kr | 2 | 9,06 |
| Focus | 2.965.652,11 kr | 3 | 4,73 |
| **Leif Mohr** | **2.686.607,22 kr** | **1** | **9,15** |

Tilboðini fyri útbúnað vóru dømd eftir prísi, góðsku og tænastu. Ein metingarbólkur ið taldi 5 fakfólk, kannaðu og góvu innsenda tilfarinum stig. Úrsliti var at Leif Mohr fekk hægst karakter í samlaðu metingini av prísi, góðsku og tænastu. Mælt verður til at gera sáttmála við Leif Mohr, áljóðandi tilboðsupphæddina.

**<u>Samlað kostnaðarmeting</u>**
Tvær kostnaðarmetingar vóru lagdar fyri Heilsu- og Eldranevndina hin 28. November 2023. Mett var um tvey uppskot, annað var at víðka køkin við 80 fermetrum, hitt at víðka við 40 fermetrum. Hesar báðar kostnaðarmetingar vístu ávikavist 16.363.916 og 14.131.978.

Í tilgongdini var avgjørt at bjóða størra uppskotið út. Tankin var, at ein møgulig sparing, kundi gerast í samráð við vinnandi feløgini. Nú tilboðini eru komin inn, er kostnaðar-meting tillaga samsvarandi. Sí skjal “23/03547_18 kostnaðarætlan B2”.

Metingin vísir eina samlaða upphædd á 14.446.148, sum er áleið upphæddini, sum var mett til minna uppskotið.

**<u>Fígging</u>**
Higartil eru disponeraðar áleið 2,9 mió. av játtanini. Umleið 1,25 mió. eru sostatt eftir av tøkari játtan. Mett verður at 1,25 mió. røkkur til arbeiðið, sum skal/kann gerast afturat í ár, sostatt er ikki tørvur á meira fígging fyri 2024.

Í tilmælinum til Heilsu- og Eldranevndina hin 28 november 2023, var sagt at; *“komið verður aftur í nevndina, í sambandi við fíggjartørvin í 2025”*. Upphæddin er víst í talvuni niðanfyri.

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Verk-ætlan** | **Upphædd** |
| | | | 2775 | | Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði | L27015 | 9.982.148 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til, at játta kr. 9.982.148 v mvg. á FÆ 2025 til verkætlan L27015, Høvuðsumvæling av køkinum á Lágargarði og geva umsitingini heimild til at gera sáttmálar við ÁTS, Frost og Leif Mohr, sambært omanfyristandandi gjøgnumgongd.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við Heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 247/24 Málslýsing - Phd starv Við Tjarnir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 08.10.2024 | 23/24 | 24/03278-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 238/24 | 24/03278-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 247/24 | 24/03278-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Magna Mohr, professara í ítrottarfysiologi um fígging til Ph.d starv við staðseting Við Tjarnir, har endamálið er gransking fyri betri heilsu og trivnaði hjá eldri fólki og menna eitt rørslu konsept kallað Fit First Elderly.

**Lýsing av málinum**
Ætlandi skal setast eitt vinnu- Ph.d starv í trý ár Við Tjarnir, at menna serstøk vísindaliga grundaði rørslukonsept til eldri. Kandidaturin verður knýttur til stjóran Við Tjarnir og verður sett/ur sum starvsfólk har.

Umbiður verður fígging frá Tórshavnar kommunu pr. ár á:
714.138,00kr í 2025
773.994,00kr í 2026
757.860,00kr í 2027

Granskingarstarvið verður býtt upp í 3 partar:

*Fyrsta árið:* Menning av Fit First Elderly konsepti, sum umfatar kropsligar venjingar við eldri borgarum Við Tjarnir 3-4- ferðir um vikuna. Venjingarnar verða kannaðar, greinaðar og tillagaðar í mun til úrslitini, fyri at passa til eldri fólk, til bæði kynini og ymsu ítrottar- og rørsluroyndir hjá luttakarunum.

*Annað árið*: Heilsuárin av kropsligu og sálarligu heilsustøðuni verða kannað, bæði áðrenn og aftaná Fit First Elderly skeið, sum vara í 16 vikur.

*Triðja árið:* Ein Fit First Elderly hondbók verður skrivað, sum greitt fer at lýsa rørslukonseptið saman við eini ítøkiligari venjingarætlan. Eisini verða ment skeið, sum kann bjóðast út til til heilsustarvsfólk og námsfrøðingar, ið vara av eldri borgarum, soleiðis at konseptið kann brúkast breitt í kommununi og gerst burðardygt.

Øll trý árini verður skipað fyri venjingum fyri eldri í Tórshavnar Kommunu, har væntandi fleiri 100 fólk fara at luttaka regluliga.

Eftirfylgjandi verður konseptið bjóðað eldri fólki í kommununi í 16 vikur hvørt vár og heyst.

Tann Ph.d lesandi skal í tíðarskeiðnum eisini samstarva tætt við tann, sum gerst Ph.d lesandi innan úrvalsítrott, og luttaka í menning av rørslukonsepti fyri barnagarðsbørn.

Kandidaturin verður knýttur at Ph.d skúlanum á Fróðskaparasetrinum. Professari í ítrotti er leiðari og vegleiðir ph.d arbeiðinum. Ein granskingarbólkur verður knýttur at, sum luttekur í kanningararbeiðnum, eins og eitt vegleiðaratoymi. Fróðskaparsetrið tryggjar at kandidaturin luttekur á viðkomandi ph.d skeiðum og ráðstevnum, og skipar fyri endaligu ph.d verjuni.

Samanumtikið verða 3 konsept ment: 1) Fit For Elderly, 2) hondbók 3) skeið til starvsfólk

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Øll vegleiðing er “in – kind” frá Setrinum, tvs. at goldið verður ikki við peningaupphædd, hóast virði av vegleiðingini er ásett í fíggjarætlanini.

Overhead í fíggjarætlanini er útreiðslur í samband við lágpraktisk viðurskiftir, so sum umsitingarligar útreiðslur, teldu, v.m.

Smb. kommunufulltrú ber til at stuðla virksemi, sum kemur einum breiðum hópi av borgarum í TK til góða, og verður mett, at granskingarúrslitini kunnu vera til fyrimuns fyri heilsu og lívsgóðsku hjá eldri fólki í kommununi, har venjing sum fyribyrging fyri sjúku við tíðini kann spara útreiðslur til eldraøkið.

Verður samtykt at stuðla fíggjarliga, skal fyrilit takast fyri evt. upphædd til komandi fíggjarár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsitingarstjórin og fulltrúi í umsitingini mæla eldranevndini til

- at stuðla vinnu Ph.d starvinum, við kr. 350.000, - árliga frá 2025 til 2027
- at játtanin til kontu 2461 stuðul til verkætlanir innan heilsu- og eldramál verður økt við 350.000 kr. komandi 3 árini til endamálið
- at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at full fígging fæst til verkætlanina, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 248/24 TK ynskir yvirlýsing frá landsstýrinum um Airbnb og stutttíðarleigu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2024 | 162/24 | 24/03446-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 262/24 | 24/03446-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 248/24 | 24/03446-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu árini eru Føroyar vorðnar eitt alsamt betri umtókt ferðavinnuland, og fleiri hús verða umvæld og keypt til ferðavinnuendamál. Hetta hevur ávirkan á útboðið av bústøðum í kommununi og ávirkar somuleiðis trivnaðin og sosiala bygnaðin í grannaløgum, har stutttíðarleiga verður miðsavnað.

Í kanning, sum Vinnuhúsið hevur latið gjørt í november 2023, um starvsfólkatørv í privatu vinnuni verður víst á bústaðartrot sum eina bygnaðarliga forðing í sambandi við stóra starvsfólkatrotið, vit síggja í dag. Umframt hetta er talið av seingjarplássum til stutttíðarleigu í dag tvífalt so stórt sum talið av seingjarplássum á gistingarhúsum, og skulu hotellini tí kappast við privatpersónar, ið ikki eru álagdir somu treytir, sum hotellini eru.

Fleiri hús í Havnini standa, sambært landsfólkayvirlitinum, skrásett uttan nakran fastbúgvandi, og serliga er tað í ávísum pørtum av Havnini, sum t.d. í gomlu Havnini. Fleiri av hesum 'tómu' húsunum verða útleigað í styttri tíðarskeið. Eisini verða nýggjar íbúðir bygdar og keyptar til stutttíðarleiguendamál. Í mun til grannalond okkara hava vit í Føroyum onga lóggávu ella ásetingar um stutttíðarleigu, og Tórshavnar kommuna ynskir, at heita á Landsstýrið um, at geva Tórshavnar kommunu heimild at seta treytir og ásetingar um stutttíðarleigu í kommununi.

**Lýsing av málinum**
Sambært leitifunkuni á Airbnb vóru 987 leigumál í Føroyum síðst í august 2024. Hetta talið er sannlíkt eitt vet hægri á hásumri. Hyggja vit at tølunum seinastu fimm árini, síggja vit, at talið er vaksið skjótt. Í 2017 lá talið á 306 leigumálum, og í 2022 var talið komið upp á 702 leigumál.

**Fakta om stutttíðarleiðu í Føroyum og í Tórshavnar kommunu**
- **Manglandi lóggáva:** Ongin lóggáva ella reglugerð, sum fevnir um stutttíðarútleigu gjøgnum pallar so sum Airbnb, eru í Føroyum.
- **Manglandi lokalt framtak:** Eingin staðbundin nevnd ella eigarafelag hevur sett treytir til Airbnb ella til stutttíðarleigu, hóast hetta er vanligt aðrastaðni. Tó finnast eindømir. Leigar tú eina lestraríbúð á Finsen, Nætingaheiminum undir Fjalli ella Studentaskúlaheiminum á Berjabrekku, stendur í viðtøkunum § 12 at:

  *Tað er ikki loyvt at leiga ella framleiga íbúðina á airbnb, boligportal.dk ella øðrum heimasíðum, har bústaðir verða leigaðir ella umbýttir*

**Fyrimunir við stuttíðarleigu í kommununi**
- **Økja ferðafólkatalið:** Stutttíðarleiga kann draga fleiri ferðafólk til býin og bygdirnar og harvið virðisøkja ognir og skapa búskaparvøkstur, eitt nú í tænastuvinnuni.
- **Inntøkur til húsaeigarar:** Stutttíðarleiga gevur húsaeigarum møguleika fyri at økja um sína inntøku. Hetta kann styrkja fíggjarligu støðuna hjá húsaeigarum og skapa nýggjar vinnuligar vegir.
- **Fjølbroyttir gistingarmøguleikar:** Nýggj stutttíðarleigumál økja um gistingarmøguleikar hjá ferðafólki og skapa alternativar møguleikar umframt gistingarhúsini. Hetta kann gera Tórshavnar kommunu til eitt meira fjølbroytt ferðamál.

**Vansar við Airbnb í kommununi**

- **Trýst á bústaðarmarknaðin:** Um lutfallið av húsum, sum verða útleigað til stutttíðarleigu, veksur, gerast, alt annað líka, færri hús tøk á bústaðarmarknaðinum og hetta kann hækka bústaðarprísirnar.
- **Ávirkar grannaløg:** Stutttíðarleiga kann hava við sær økta ferðslu og larm í grannaløgum og kann ávirka trivnaðin og sosiala virksemið í grannalagnum, í og við at stór útskifting er á fólki í bústøðum, umframt at hesi ikki luttaka í virkseminum í grannalagnum.
- **Væntandi eftirlit:** Í 2019 gjørdi TAKS eina kanning av, hvussu nógv fólk upplýsa TAKS um leiguinntøku sína. Úrslitið vísti, at bert helvtin av útleigarum ger hetta. Hetta merkir væntandi skattainntøkur hjá kommununi, og at tað er trupult at vita júst hvussu stórur leigumarknaðurin er í vavi.

**Uttanlands:**
Uttanlands eru krøv til stutttíðarleigumál galdandi í flest øllum væl umtóktum ferðamálum. Treytirnar eru eitt úrslit av lobbyismu frá gistingarhúsum og krøvum frá borgarum og politikkarum at tálma trupulleikum, sum standast av vaksandi íbúðar- og leiguprísum, gangi og dálking, gentrifisering o.ø. Her eru nøkur dømi um ítøkiliga reglugerð:

Í fleiri býarpørtum í **Amsterdam** hava eigarar í mesta lagi loyvi at leiga íbúð sína út 30 nætur árliga, og í mesta lagi fýra gestir kunnu gista í senn.

**Barcelona** gevur loyvi til eitt avmarkað tal av leigumálum og krevur ein lutfalsliga høgan ognarskatt frá eigarum av stutttíðarleigumálum.

Millum 2016-2018 hevði **Berlin** nakrar av teimum strangastu treytunum til stutttíðarleigumál. Býurin útflýggjaði eitt avmarkað tal av loyvum, og annars var bert loyvt at útleiga kømur í egnari íbúð. Bót upp til 100.000 EUR kundi krevjast fyri brot á reglugerð, men hóast hetta, vísti tað seg at vera trupult at handhevja, og óteljandi stutttíðarleigumál virkaðu í hesum tíðarskeiðnum. Í dag skalt tú hava adressu á leigumálinum, sum tú síðani sleppur at útleiga frítt. Loyvi krevst til bústað nummar tvey, sum í mesta lagi kann útleigast 90 nætur um árið.

**New York City** hevur yvirhálað Berlin við strangum reglugerðum. Loyvi krevst til øll stutttíðarleigumál, ein skal hava adressu á bústaðnum og enntá vera til staðar, tá íbúðin verður leigað. Harafturat kunnu bert tveir gestir gista í senn.

Í **Reykjavík** hava tey síðani 2017 gjørt mun á ”summarhúsum” og ”heimahúsum”. Tú kanst bert útleiga heimabústað (ikki summarhús) upp til 90 nætur árliga og í mesta lagi 30 dagar í senn. Harafturat kanst tú bert tjena upp til 2.000.000 ISK um árið (umleið 100.000 DKK) upp á at leiga út. Um ein eigur tveir bústaðir, eitt heim og eitt summarhús, so er sama markið á inntøku og gistingarnætrum galdandi fyri bæði húsini, sum um tey vóru eitt. Heim, sum hava fleiri enn fimm kømur ella pláss fyri fleiri enn 10 fólkum, fella uttan fyri reglugerðirnar.

Í **Danmark** sleppur tú bert at útleiga egnan bústað, um hesin er skrásettur sum heilársbústaður, og upp til 70 dagar um árið. Tó kunnu strangari reglur fyrikoma fyri eigara- ella lutaíbúðir. Plan- og landdistriktsstyrelsen hevur ábyrgd av stutttíðarleigu til feriu- og frítíðarendamál. Kømur eru ikki við í reglugerðini, og tað er ikki neyðugt at skráseta leigumál.

**Nakrir møguleikar:**

- **Fyri at fyribyrgja at stutttíðarleiga økir bústaðarneyðina:** Hámark kann setast á gistingar ella árliga inntøku, soleiðis at tað ikki loysir seg ov væl, samanborið við langtíðarleigu.

- **Fyribyrgja kapitalakkumulatión/-spekulatión á bústaðarmarknaðinum, sum ikki gagnar vanliga fólkinum:** Bústaðarskylda og/ella strangari krøv til útleigan av ogn nummar tvey.

- **Ein nærdemokratisk loysn:** Granna- og eigarafeløg og møguliga staðbundnar nevndir seta krøvini. Hóast tað er trupult at handhevja reglugerðir, so er tað har, kjakini eiga at fara fram, tí tað er sera ymiskt, hvussu stutttíðarleiga ávirkar jaliga og neiliga kring landið.

- **Stutttíðarleigumál skrásetast hjá avvarandi myndugleika:** Tað vísir seg at vera trupult at íverkseta og handhevja reglugerð, uttan so at stutttíðarleigumál skulu skrásetast hjá viðkomandi myndugleika. Óansæð skulu loysnir finnast í samráð við fleiri áhugapartar og ikki minst við teimum stutttíðarútleigarum, sum koma inn í ferðavinnuna og veita tænastur til frama fyri vitjandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekurin mæla til:
- at Tórshavnar kommuna heitir á landsmyndugleikarnar um at fáa heimild til at seta reglur viðvíkjandi stutttíðarútleigan gjøgnum pallar so sum Airbnb.
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

## 249/24 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 20.12.2022 | 76/22 | 21/02196-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.12.2022 | 329/22 | 21/02196-2 |
| 18 Býráðsfundur | 21.12.2022 | 302/22 | 21/02196-2 |
| 19 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 34/23 | 21/02196-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 198/23 | 21/02196-2 |
| 21 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 163/23 | 21/02196-2 |
| 22 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 189/23 | 21/02196-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 15/24 | 21/02196-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 54/24 | 21/02196-2 |
| 25 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 39/24 | 21/02196-2 |
| 26 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 60/24 | 21/02196-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 07.10.2024 | 61/24 | 21/02196-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 260/24 | 21/02196-2 |
| 29 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 249/24 | 21/02196-2 |
| 30 Býráðsfundur | | | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel

Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4

| | Býráðsfundur<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1076<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó við tí fyrivarni at tað ikki skal hava nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið um vetrarfriðing í Kollafirði fer í gongd nú.

**Økisnevndin 02. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 11. januar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tilgongdina, at vetrarfriða Kollafjørð er nú gjørd ein útrokning, sum vísir eitt estimat fyri hvat kommunan skal gjalda til hegning og avloysing av vetrarbiti fyri hagarnar á Signabø og Oyrareingir. Í samráð við bøndirnar er løgd ein linja fyri hvussu hegningin skal skipast. Síðani er roknað út hvussu nógv lendi bøndirnir missa í sambandi við vetrarbit.

| **Hegn.** | **metrar** | **Kr./m** | **íalt** |
|---|---|---|---|
| Signabøur | 1.780 | 150 | 267.000 |
| Oyrareingir | 3.740 | 150 | 561.000 |
| | | | |
| **Mist vetrarbit:** | **M$^2$** | **kr/m$^2$** | |
| **Signabøur** | | | |
| Velt | 57.697 | 4,80 | 276.946 |
| ikki velt | 25.149 | 0,70 | 17.604 |
| **Oyrareingir** | | | |
| Velt | 0 | 4,80 | 0 |
| ikki velt | 0 | 0,70 | 0 |
| Rulluportur | 1 | 70.000 | 70.000 |
| Annað | | | 50.000 |
| | | | 1.242.550 |

Í uppgerðini er brúkt 150,- fyri hegning pr. metur. Tvs. 35,- kr. fyri tilfarið og 115,- fyri hegningina pr. metur. Í hesi útrokning er ikki tikin støða til hvat viðlíkahald av hegninum í framtíðini kemur at kosta kommununi.

**Økisnevndin 07. mars 2016:** Samtykt at beina málið í figgjarnevdina til ummælis.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostnað og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at umsitingin skal fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostna og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi er ynskiligt, at fáa eina ábending frá kaldbaksnevndini um tørvin á vetrarfriðing í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Staðbundna nevndin hevur umrøtt uppskot frá umsitingini um vetrarhegn í Kaldbak. Avtalað varð, at hava ein fund við festararnar í Kaldbak um hegnlinju.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingir og Signabø er fylgjandi samlað uppgerð gjørd yvir hvat hetta umleið kemur at kostað kommununi:

| | | |
|---|---|---|
| Longd hegn: | 16.800 m. | 1.512.000 |
| Rulluportur: | 2. stk. | 300.000 |
| Avloysing vetrarbit | 168.700 m2 | 809.760 |
| Árligt viðlíkahald | | 100.800 |
| Tilsamans | | 2.621.760 |

Prísurin fyri hegn er settur til 50,-/m. til hegn, pelar o.a. og prísurin fyri uppsetan er settur til 40 kr./m. Rulluportur eru sett til 150.000,- pr. stk. við ísetan. Avloysing fyri vetrarbit er sett til 0,70 kr./m2 fyri ódyrkað og 4,80 kr./m2 fyri dyrkað lendi. Árligt viðlíkahald er sett til 6 kr. pr. metur og tá er avskrivingin sett til 30 ár.
Metingin er gjørd við støði í fylgjandi fyritreytum hjá umsitingini:

- Hegnføringin er ikki gjørd í samráð við eigarar og bøndir á staðnum
- Støða er ikki tikin til um verðandi hegn kann nýtast, har tað stendur frammanundan
- Kostnaður fyri rulluportur er mettur til 150.000 kr. við ísetan, undantikið á landsvegi
- Avloysing av vetrarbit er mett, men um tað eru ivamál, kann Matrikulstovan gera neyvar mátingar. Búnaðarstovuni tekur endaliga avgerð um avloysing av vetrarbiti á almennari festijørð, saman við festaranum
- Ymisk jarðarstykkir, sum kommunan og onnur hava keypt mugu kannast nærri um avloysing fyri vetrarbit er goldin.
- Árliga viðlíkahaldið er sett til 6,-. kr/metur

Út frá hesum fortreytum kann sigast, at samlaði kostnaðurin upp á 2,6 mill fyri vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø kann blíva munandi lægri, um størri ella minni strekkir av hegni kunnu endurnýtast og um avloysingin av vetrarbitið ikki blívur so umfatandi sum mett er.

**Økisnevndin 02. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá heildarætlanini.

**Kollafjarðarnevndin 09. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Útsett.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 31. maj 2016:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at fara undir eina heildarætlan at vetrarfriða alla kommununa og at peningur til arbeiðið verður játtaður í sambandi við fíggjarætlanina 2017.

**Økisnevndin 29. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 30. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 05. september 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hest/Koltursnevndin 08. september 2016:** Kunnað varð um málið. Ynski frá staðbundnu nevndini í Hesti at arbeiða við vetrarfriðing í Hesti.

**Økisnevndin 16. januar 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Á síðu 5, fjórsíðsta reglubrotið í samgonguskjalinum frá 30. decembur 2016, stendur «vetrarfriðing verður framd, har ynski er um tað». Um hesin málsetningur skal náast er átroðkandi, at peningur verður settur av til verkætlanina. Hetta kann gerast við einari passandi upphædd um árið - í nøkur ár. Ein leyslig meting vísir, at talan er um 6 og 9 mio. fyri alla verkætlanina - alt eftir hvussu nógvar bygdir ynskja vetrarfriðing.

Fyri at fáa gongd á arbeiðið, har Kollafjørður er peikaður út sum mest átroðkandi, bæði fyri trivna og trygd, er tað sera umráðandi, at peningur verður settur av til verkætlanina soleiðis, at umsitingin kann fara undir arbeiðið at tosað víð teir bøndir og privat fólk, sum eiga lendið í Kollafirði, ið verða rakt av einari vetrarfriðing.

Um peningur verður játtaður og áhugi er í politiska valdinum til hesa verkætlan, so er eingin forðing fyri at fara undir, at fáa tær formellu avtalirnar upp á pláss og síðani at nýta ein part av summarinum og heystinum til at seta skjøtul á sjálva hegningina.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til hesa verkætlan og síðani, um meirluti er fyri tí, sendir málið víðari til fíggjarnevndina til støðutakan.

**Økisnevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at fara undir eina tilgongd at vertrarfriða økini í kommununi og at peningur verður settur av í eini langtíðaríløguætlan.

**Ískoyti:**
Alt bendir nú á, at peningur verður settur av til vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu. Alt eftir hvussu stór upphæddin verður, so er tað neyðugt, at økisnevndin tekur støðu til hvønn leist, umsitingin skal leggja fyri dagin, í hesum máli.

Talan hevur verið um, at umsitingin bjóðar umboðum fyri hagapartin Heimara Helvt í Nólsoy til fundar, fyri at fáa gjørda eina endaliga avtalu um vetrarfriðing av bygdini. Í Nólsoy. Næstan øll hegningin er liðug og manglar tí bert ísetan av tveimum rulluportrum.

Eisini er Kollafjørður nevnd, sum ein bygd har vetrarfriðing er alneyðug – bæði tá ið hugsað verður um trygd á vegunum og trivnaðinum í bygdini.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til ein raðfesting av bygdunum.

**Økisnevndin 03. apríl 2017:** Nevndin samtykti at gera eina raðfesting soleiðis at byrjað verður í Nólsoy og annars lýsa nærri hvussu viðlíkahald er skipað í øðrum kommunum.

**Ískoyti:**
Økissamskiparin kunnar um gongdina í málinum.

**Økisnevndin 15. mai 2017:** Kunnað varð um um málið og økissamskiparin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**

**Bygdahegn í Kollafirði**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur sett 1 mió. kr. av til vetrarfriðing av bygdunum í 2017. Umsitingin hevur á fundi við avvarðandi festarar og eigarar hava avtalað eina mannagongd og ætlan fyri uppsetan av bygdahegninum. Samráðst verður við avvarðandi bóndir og privatar eigarar um avtalur, um víddir, avloysing og gjøld fyri miss. Hetta er treytað av, at peningur verður játtaður til framhald.
Ætlanin er nú, at seta skjøtul á arbeiðið við at stiga frá norðara enda í bygdini og heim til skúlan. Talan er um uml. 3.500 m., og við einum eindarprísi upp á 100 kr. pr. m., sum tilboð er givið uppá, so er talan um 350 túsund krónur.

Tá ið peningurin er játtaður, verður biðið um tilboð frá trimum veitarum upp á arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 350.000 av konto 6210.

**Økisnevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 350.000 av konto 6210 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 16. oktober 2017:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið er byrjað.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við umboð frá Heimara Haga í Nólsoy fyri, at kunna tey um gongdina í málinum viðvíkjandi vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu. Eisini arbeiðir umsitingin við einum uppskoti til avatalu við Heimara Haga í Nólsoy um vetrarfriðing.

Økissamskiparin kunnar nevndina um uppskot til avtalu millum Heimara haga og kommununa.

**Økisnevndin 06. november 2017:** Samtykt at arbeitt verður víðari við málinum so vetrarfriðingin í Nólsoy kann avgreiðast.

**Økisnevndin 09. apríl 2018:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu, so verður arbeitt við tveimum bygdum. Deils Nólsoy, har arbeiðið byrjaði heilt aftur í 2005 og so eisini Kollafjørður.

Støðan í Nólsoy er tann, at umsitingin hevur seinastu tvey árini verið í samráðingum við umboð fyri hagapartin Heimara Helvt og eru tær samráðingarnar nú komnar so langt, at bert nøkur formell viðurskifti skulu fáast upp á pláss, áðrenn sáttmálin kann leggjast fyri hagafundin og síðani eisini fíggjarnevndina í TK. Ætlanin er, at fáa tey formellu viðurskiftini upp á pláss í 2019 og síðani fáa útint tað arbeiðið ið manglar, í 2020.

Viðvíkjandi Kollafirði, so eru fleiri avtalur við bøndurnar komnar upp á pláss. Talan er um íalt seks ymsar avtalur, umframt Oyrareingir og Signabøur. Fimm av teimum seks avtalunum í Kollafirði eru um at verða komnar undir land, men enn manglar Todneshagin. Stórsti og mest umfatandi hagin er Sjóarhagi Niðaripartur og eru ávís viðurskifti har, sum ikki eru avgreidd enn. Nevnast kann, at eitt mál liggur í yvirbúnaðarstevnu og skal avgerð takast, um hvør skal halda hegnið fram við landsvegnum í Líðini. Í Kollafirði er ætlanin, at fáa allar avtalur upp á pláss og fáa hegnað liðugt í 2020.

**Økisnevndin 04. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avtalan um vetrarfriðing í Nólsoy við Heimara Haga er nú við at verða komin undir land, og vil umsitingin tí leggja eitt uppskot til avtalu millum Heimara Haga og Tórshavnar kommunu fyri økisnevndina til góðkenningar og síðani, at beina málið fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar.
Mettur kostnaður fyri at gera arbeiðið liðugt í Nólsoy, er uml. 265.000,- uttan mvg.

| | |
|---|---|
| Ísetan av rørportrum 70.000,- x 2 | 140.000,- |
| Uppsetan av hegn um. 500 m x 150 kr./m | 75.000,- |
| Portur o.a | 50.000,- |
| Íalt | 265.000,- |

Í avtaluni skal Tórshavnar kommuna gjalda haganum kr. 10.000,- um árið, fyri leigu av lendinum ið liggur innan fyri vetrarhegnið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin góðkennir avtaluna og at avtalan verður løgd fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar. Kostnaðurin fyri liðugtgerðan av hegni og ísetan av rørportrum skal gjaldast av íløgukonto «vetrarfriðing» 6275 og árliga gjaldið á 10.000,- kr. skal gjaldast av rakstrarkonto 6210.

**Økisnevndin 09. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við økisnevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
sambandi við at peningur manglar á verkætlanini L62035 «Vetrarfriðing» verður mælt til, at flyta kr.145 túsund frá karminum LK62065 til vetrarfriðing L62035.

Í sama viðfangi verður eisini mælt til, at flyta 1. mió. av karminum LK62049 «vetrarfriðing Nólsoy og Kollafjørður» til verkætlanina L62035 «vetrarfriðing». Hesin peningur skal m.a. nýtast til ísetan av tveimum rørportrum í Nólsoy (sí ískoyti 04. nov. 2019) og til ymiskt arbeiði í sambandi við vetrarfriðing í Kollafirði.

Eisini skal ein partur av peninginum nýtast til at taka gamla almenna wc burtur í Nólsoy fyri síðani at fáa nýggja wc-skúrin, ið var keyptur í fjør, settan til. Sama er galdandi fyri Hest, har ein wc-skúrur er keyptur og skal festast og íbindast verandi rør og leiðingar.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at 145 túsund krónur verða fluttur av karminum LK62035 til verkætlanina vetrarfriðing nr. L62035. Síðani eisini, at 1 mió. krónur verða fluttar av karminum LK62049 til verkætlanina L62035 vetrarfriðing. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin «Vetrarfriðing» varð upprunaliga sett á skrá, í sambandi við at kommunan fór undir at seta bygdarhegn upp í øllum bygdunum í kommununi. Ynskiligt er at fáa seyðin út úr bygdunum, so at til ber at fríðka um bygdina og skapa betri trivnað millum fólk. Verkætlanin hevur somuleiðis verið við til onnur viðurskiftir í bygdunum, so sum vesi-skúrar í Hesti og Nólsoy.

Allar rokningar eru nú goldnar, og er verkætlanin í halli við kr. 85.682.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6611 | | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | 6275 | L62035 | Vetrarfriðing | | 85.682 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 85.682 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Av tí at útreiðslur í sambandi við viðlíkahald av hegni og tílíkum verða goldnar av rakstrarjáttanini 6611, Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk, verður mælt til, at hallið verður goldið av hesi játtan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at hallið á kr. 85.682 verður goldið av konto 6611, Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk, og at málið verður beint í býráðið umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli**
Vísandi til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 4. mars 2024 mælir tekniski stjóri náttúru- og umhvørvisnevndini til at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 252/24 Spillivatnsætlan hjá Tórshavnar kommunu 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 28.11.2023 | 54/23 | 23/04594-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 330/23 | 23/04594-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.02.2024 | 10/24 | 23/04594-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 04.03.2024 | 18/24 | 23/04594-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 03.06.2024 | 45/24 | 23/04594-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.06.2024 | 24/24 | 23/04594-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 245/24 | 23/04594-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 252/24 | 23/04594-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn skulu kommunur gera eina spillivatnsætlan, sum saman við korttilfari inniheldur upplýsingar um verandi og ætlaðar spillivatnsskipanir við atliti at nýgerð, útbygging, umvælingum o.ø., og hvussu arbeiðini verða raðfest.

Sambært spillivatnskunngerðini skulu kommunur triðja hvørt ár dagføra teirra spillivatnsætlan. Seinasta spillivatnsætlanin hjá Tórshavnar kommunu varð góðkend av Umhvørvisstovuni tann 30. januar 2013, og Tórshavnar kommuna hevur fingið longda freist til 15. desembur 2023 at dagføra spillivatnsætlanina.

**Lýsing av málinum**
Spillivatnsætlanin er planleggingaramboð hjá kommununi á spillivatnsøkinum. Spillivatnsætlanin lýsir spillivatnsskipanina í kommununi og árin á umhvørvið, og hvørji átøk eru neyðug viðvíkjandi viðlíkahaldi, nýgerð, reinsing o.ø. komandi árini.

Spillivatnsætlanin 2023 fevnir um dagføring av spillivatnsleiðingum og útrenslum í allari kommununi. Ætlanin er at savna alt spillivatn í kommunala spillivatnsskipan, sum skal verða leidd út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Hetta fyri at lúka krøvini sambært spillivatnskunngerðini. Hartil er ætlanin at skilja felagsleiðingar sundur í regnvatnsleiðingar og skittvatnsleiðingar og kanna økta reinsing av spillivatninum.

Fyri at fáa útgreinað hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering, og undir eina tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu arbeiði.
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til, at raðfesta arbeiðini í spillivatnsætlanini yvir eitt 10 ára tíðarskeið, tá allir bygningar og útrensl skulu lúka krøvini í spillivatnskunngerðini.

Høvuðsniðurstøðurnar í Spillivatnsætlanini 2023:
- Í 2020 vóru 434 km av spillivatnsleiðingum í Tórshavnar kommunu. 2013 - 2020 komu áleið 132 km nýggjar leiðingar.
- Nøkur støð eru eftir, har eingin spillvatnsleiðing er gjørd. Peningur eigur at verða settur av, so at arbeiðið er liðugt um 10 ár.
- Spillivatnsútrensl eiga at verða samlað.
- Tá nógv regn er, kunnu spillvatnsleiðingar gerast fullar. Verður regnvatn og skittvatn skilt sundur, fer hetta at minka um tørvin á nýggjum rørum.
- Kemisk og biologisk reinsing av spillivatninum eigur at verða kannað nærri.
- Spillivatnið inniheldur fleiri sløg av dálkingarevnum. Tørvur er á kunningarátøkum til borgarar og vinna um nýtslu av kemiskum evnum og dálking.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
j. nr. 23/04594-2 Fylgiskjøl nr. 1-33

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við spillivatnsætlanini, og at spillivatnsætlanin verður beind í náttúru- og umhvørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 28. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Málið beint í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 12. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 04. mars 2024:** Kunnað varð um málið, og heitt varð á umsitingina at leggja ítøkiliga ætlan fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Ískoyti til Spillivatnsætlanina 2023 lýsir kostnaðarmetingina av verkætlanunum, ið skulu setast í verk, fyri at Tórshavnar kommuna lýkur krøvini í spillivatnskunngerðini.

Umhvørvisstovan heitir á Tórshavnar kommunu at staðfesta áðrenn 04.06.2024, nær spillivatnsætlanin verður handað Umhvørvisstovuni til viðgerðar.

**Nýggj skjøl:**
Jnr. 23/04594-11:
Rapport – Ískoyti til Spillivatnsætlanina 2023
Fylgiskjal 34 – Kostnaðarmeting av arbeiðinum og tilfarið við hjálp av prísmetingini
Fylgiskjal 35 – Ætlan fyri BX1-BX4
Fylgiskjal 36 – Ætlan fyri BX5
Fylgiskjal 37 – Ætlan fyri BX6 – BX7
Fylgiskjal 38 – Ætlan fyri BX8, ÚB16
Fylgiskjal 39 – Ætlan fyri BX10
Fylgiskjal 40 – Ætlan fyri BX11
Fylgiskjal 41 – Ætlan fyri BX12 – BX15 og ÚB18 – ÚB20
Fylgiskjal 42 – Ætlan fyri ÚB21 - ÚB22 og BX16
Fylgiskjal 43 – Ætlan fyri ÚC2 - ÚC5 og CX1
Fylgiskjal 44 – Ætlan fyri ÚC6 og ÚC7
Fylgiskjal 45 – Ætlan fyri CX2 og CX3
Fylgiskjal 46 – Ætlan fyri GX
Fylgiskjal 47 – Ætlan fyri HX
Fylgiskjal 48 – 2024.05.02 Kostnaðarmeting - Kloakkútleiðingar frá Íshúsinum á Argjum til Súpanarvík
Fylgiskjal 49 – Ætlan fyri Útleiðingin við Súpanarvík
Fylgiskjal 50 – Ætlan fyri Útleiðingarnar við Válgaravík
Fylgiskjal 51 – Ætlan fyri Útleiðingarnar við Sersjantarvíkina og Eystfalssker
Fylgiskjal 52 – Ætlan fyri Útleiðingin við Íshúsið, Argir
Fylgiskjal 53 – Spillivatnætlan avtalur 2024_US

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við spillvatnsætlanini og tilhoyrandi kostnaðarmeting og tíðarætlan, ið liggja sum grund til einstøku verkætlanirnar, og beina málið í náttúru- og umhvørvisnevndina til kunningar.

**Tekniska nevnd 03. juni 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at bjóða út arbeiðið sambært raðfestingini í kostnaðarmetingini og tíðarætlanini, og at hædd verður tikin fyri eini rakstrarkontu á spillvatnsøkinum til komandi fíggjarætlan.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. juni 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Spillvatnsætlanin við tilhoyrandi ískoyti um tíðar- og kostnaðarætlan, sum hon er samtykt í teknisku nevnd, inniber fíggjarligar disponeringar fyri árini 2024-2028. Henda disponering er í yvirliti skipað soleiðis:

- 2025: kr. 10.700.000
- 2026: kr. 14.000.000
- 2027: kr. 16.200.000
- 2028: kr. 17.400.000

Nøkur av átøkunum fyri 2025 mugu útsetast til komandi árini, og eigur hetta at endurspeglast í fíggjarkørmunum fyri hesi árini. Fyri at røkka spillivatnsætlanini er avgerandi, at fíggjarkarmur er tøkur á hvørjum ári, sum ætlanin umfatar, at gera neyðugu verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at fíggjarnevndin tekur undir við spillvatnsætlanini við tilhoyrandi kostnaðar- og tíðarætlan,
- at nevndu verkætlanir verða lagdar fyri politiskt so hvørt sum tær skulu fremjast, við umbøn um játtan til arbeiðið.
- at málið verður beint víðari í býráðið.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 253/24 Umsókn um byggiloyvi til úthús á matr. nr. 915k, Perskonugøta 6B, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.09.2024 | 138/24 | 24/03411-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.10.2024 | 59/24 | 24/03411-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 244/24 | 24/03411-2 |
| 4 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 253/24 | 24/03411-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá eigaranum um at byggja ein skúr og keypa lendi.

**Lýsing av málinum**
Søkt verður um byggiloyvi til ein skúr, sum er 4 x 6 m til víddar.

Eisini verður søkt um at keypa uml. 20 $m^2$ av vegaøki. Talan er um ein kíla, sum gongur inn á grundstykkið matr. nr. 915k.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið, sum søkt verður um at keypa, er partur av Perskonugøtu, lagt út til veg og hevur litra cæ.
Talan er um ein kíla við endan á vegnum, og at síggja til sær tað út, sum ætlanin hevur verið at føra Perskonugøtu saman við Hetlandsvegnum, men nú eru eini sethús bygd, soleiðis at henda ætlanin ikki letur seg gera.

Kommunan hevur tí ikki nakað at brúka hendan "vegkílan" til.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki

**Skjøl**
jnr. 24/03411 Umsókn og tekningar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti og at beina málið um keyp av lendi í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í fíggjarnevndina umvegis teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 254/24 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 80/24 | 24/01759-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 07.10.2024 | 6/24 | 24/01759-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 254/24 | 24/01759-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu árini hevur Tórshavnar kommuna móttikið fleiri umsóknir um at byggja og innrætta neyst kring Kollafjørð, sum eisini kunnu nýtast til frítíðarhús. Galdandi byggisamtykt fyri E-økir loyvir neystabygging, men gevur ikki loyvi at innrætta neystini til frítíðarhús. Hetta uppskotið, um nýggja serstaka byggisamtykt, snýr seg um at vísa á, hvørji neystaøkir kring Kollafjørð, eru egnaði til at loyva partvísa innrættan av frítíðarhúsi í neystum.

**Lýsing av málinum**
Í 2022 varð serstøk byggisamtykt gjørd fyri neystaøkið á matr. nr 208, 211c, 211a og 209b, Kollafjørður (sí mál: 20/04636). Í dag er hetta einasta neystaøkið kring Kollafjørð, har loyvi er at partvíst innrætta neyst til frítíðarbústað. Ætlanin er at víðka økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, soleiðis at fimm onnur neystaøkir vera fevnd av somu serstøku byggisamtykt. Tey tilsamans seks neystaøkini verða lýst í *kortskjal1*, og eru hesi:

1. við Sjógv
2. á Lygnnesi
3. á Lygnnesi, har serstøk byggisamtykt, ið loyvir frítíðarhúsum, er galdandi
4. Við Kópastein
5. Við bátabrúgvarnar á Signabø
6. á Signabø

Ásetingarnar fyri omanfyri nevndu neystaøki eru júst tær somu, sum verandi serstaka byggisamtykt fyri neystaøkið á matr. nr 208, 211c, 211a og 209b áseta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økini, sum uppskotið um serstaka byggisamtykt fevnir um, eru í umráðispartinum E í 3. grundumráði, har hesar ásetingar eru:

*1 Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*

*2 Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samstundis sum gerandisligi týdningurin av útróðrarbátum hevur verið fallandi, og fleiri neyst standa óbrúkt, er tað vorðið meira vanligt at umbyggja neyst til frítíðarbústað. Hetta er eitt grundleggjandi øðrvísi endamál, og hevur við sær øðrvísi treytir til sjálvt neystið. Tí er týdningarmikið at skipa ný- og umbygging við eini tilvitan um, at myndevnið av neysti fram við sjóvarmála er eyðkendur og varðveitingarverdur partur av serføroyskum bygdalandslagi.

Í Tórshavn, Argjum og Hoyvík, er framvegis stórur eftirspurningur eftir neystum og neystagrundum til bátavirksemi burturav. Umsitingin ynskir tí at halda fast í verandi ásetingum har og ikki loyva frítíðarbústøðum í neystum fram við sjóvarmálanum í hesum økjum.

Kring Kollafjørð standa hinvegin fleiri óbrúkt neyst, samstundis sum at frítíðar- og ferðavinnuligir menningarmøguleikar framvið longu strandarlinjuni eru í vøkstri. Millum Kjalnes norðast í Kollafirði, og gomlu hvalastøðina í Signabø eru umleið 8,7 km av strandarlinju, harav umleið 1100 m er útfylling í samband við landsveg og 2800 m er bryggja. Restin, umleið 4850 m (ella 55%) er áarósi og fjøra. Fram við fjøruni standa í dag 58 neystabygningar. Umsitingin ynskir at verja og varðveita fjøruna, og at skipa nøkur neystaøkir soleiðis at møguleiki eisini verður at innrætta frítíðarhús á ovaru hædd á neystunum.

Øll 6 økini, ið uppskotið um serstaka byggisamtyktin umfatar, hava síðani 1978 verið lýst sum E-øki. Fleiri neyst standa uttan fyri økið, sum uppskotið um serstaka byggisamtykt fevnir um, m.a. neystaøkini við Kjalnes og Todnes. Tey eru ikki við í serstøku byggisamtyktini vegna frámæli frá Landsverki um at innrætta frítíðarhús á økjum, ið eru heilt ella partvís innanfyri byggilinju fram við landsvegi (sí *Svar viðv. bygging av neystum innanfyri byggilinju.pdf*.). Eisini er natúrlig fjøra og sporadisk neyst á Oyrareingum og millum Langasand og Sjógv, har umsitingin ynskir at halda fast í verandi ásetingum og á hendan hátt varðveita tey neystini, sum eru har, og forða fyri, at tey verða umbygd og innrættað til frítíðarhús. Hetta er fyri at verja og varðveita fjøruna og verandi dámin á hesum økjunum.

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður*, journal nr. 20/04637.
- *Umsókn um byggiloyvi / serstaka byggisamtykt til neyst/frítíðarhús á matr. nr. 192a, í Líðini, Kollafirði,* journal nr. 23/05125.
- *Umsókn at broyta neystaøkið á Kjallnestanga á matr. nr. 42, 41, 37b, 29b og 31b, Kollafirði til frítíðarhúsøki,* journal nr. 23/0256.

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

- *Svar viðv. bygging av neystum innanfyri byggilinju.pdf,* journal nr. 24-01759-2.
- *Uppskot – Serstøk byggisamtykt fyri Neyst í Kollafirði,* journal nr. 24-01759-3.
- *kortskjal1,* journal nr. 24-01759-4.

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri neystaøkir kring Kollafjørð, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og harumframt at neystaøkið á Kjalnesi verður tikið við í serstøku byggisamtyktina.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 255/24 Nýggjar mannagongdir fyri burturbeining av asbest

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.09.2024 | 29/24 | 24/07021-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 226/24 | 24/07021-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 227/24 | 24/07021-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 246/24 | 24/07021-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 255/24 | 24/07021-1 |

**Upprunin til málið**
Tyrvingarplássið í Húsahaga er niðurlagt, og skal tí alt asbest nú koyrast norður á nýggja tyrvingarplássið hjá IRF á Nýggjheiðum í Kvívík.

Asbest er sera heilsuskaðiligt og fyri at verja okkara starvsfólk, er bert loyvt at lata tríggjar asbestplátur ella 50 kg. av asbesti beinleiðis inn til Endurnýtsluna á Hjalla. Um talan er um størri nøgdir, skal tað latast beinleiðis til tyrvingarplássið á Nýggjheiðum.

Størri nøgdir av asbesti hava ikki verið móttiknar á Endurnýtsluni fyrr, men av tí at Tyrvingarplássið í Húsahaga er niðurlagt, verður aspest nú latið inn til Endurnýtsluna á Hjalla. Her manglar ein mannagongd, ið tryggjar trygga handfaring og flutning av asbesti.

IRF vil ikki hava, at privatir kundar koma norður til Nýggjheiðar sjálvir, uttan so at tað er gjøgnum KB, og at tað er KB, sum stýrir handfaringini – vegna borgararnar í Tórshavnar kommunu.

Verandi reglugerð um asbest má dagførast og nýggj mannagongd gerast, sum ger tað ómakaleyst hjá borgarum í Tórshavnar kommunu at burturbeina teirra asbest fyri ein fastan kostnað.

**Lýsing av málinum**
Asbest er sera heilsuskaðiligt og krevur tískil serligar reglur og mannagongdir fyri handfaring, flutning og burturbeining. Asbest skal pakkast sera væl inn, so tey vandamiklu evnini ikki fara út í umhvørvið og gera skaða.

Tá ið asbest verður burturbeint, er talan sum oftast um takplátur. Hesin bólkur í reglugerðini kemur undir størri umvælingar av einum húsarhaldi, og verður tí bólkaður sum vinnuligt burturkast. Tískil rindar borgarin fyri burturbeiningina av asbesti, tá talan er um meira enn tríggjar takplátur ella 50 kg. av asbest.

Í løtuni senda IRF og flutningsfyritøkur rokningar til KB fyri viðgerð og flutning av asbest, har KB síðani sendir rokningarnar víðari til borgaran/eigaran. Fyri at sleppa undan hesum, verður sama skipan, sum tey nýta í Danmark, tikin í brúk hjá KB.

Henda skipanin fer at gera tað møguligt hjá borgarum, at keypa stórsekkir (max. 1000 kg.) frá KB til at koyra asbest í fyri ein kostnað, sum umfatar: Sjálvan sekkin til at pakka í, flutning frá niðurtøkustaðnum til Nýggjheiðar og kostnaðin fyri burturbeiningina á Tyrvingarplássið í Kvívík.

Ætlanin er at áseta ein mettan kostnað fyri hesa tænastu, ið inniheldur prísin fyri sekkin, koyring og tyrving hjá IRF. Tá so hetta er gjøgnumført nakrar ferðir, verður prísurin eftirmettur, og ein fastur prísur ásettur.
Lógir, ásetingar o.a.
- §§ 13 og 14 í kunngerð nr. 127 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum seinast broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007

• “Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast”, ið er samtykt í Tórshavnar býráð 23. februar 2012, og sett í gildi 15. mai 2012

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/07021-2 Asbest - Almen kunning
24/07021-3 Asbest - Soleiðis gert tú!
24/07021-4 Reglugerð fyri Asbest 26.08.2024
24/07021-5 asbest-burturkast-reglugerð-2012

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla nevndini til at taka undir við omanfyri lýstu mannagongd og dagførdu reglugerðini í viðlagda skjali, jnr 24/07021-4 Reglugerð fyri Asbest 26.08.2024 og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ein borgari, sum burturbeinir meira enn 3 plátur ella 50 kg, skal altíð gjalda fyri burturbeiningina av asbesti ella eternitti – minni nøgd er ókeypis.

Prísurin fyri tyrving á Tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum hjá IRF er 2,20 kr/kg u/mvg. Prísurin fyri at tyrva er tann sami fyri allar bólkarnar (blandað tyrving, asbest, glas- og steinull og gips).

Prísurin fyri flutning er uml. 750 kr/tíma u/mvg, og flutningsfyritøkurnar taka minst 3 tímar at koyra til Nýggjheiðar.

Sum dømi kann nevnast, at eini hús á 100 $m^2$ hevur uml. 300 takplátur, har hvør pláta vigar uml. 20 kg. Hetta gevur ein kostnað uppá uml. 13.200 kr fyri at tyrva asbest ella eternit. Harumframt kemur flutningskostnaðurin sum er uml. 2.250 kr (3 tímar koyring á 750 kr/tíma). Hetta gevur ein samlaðan kostnað fyri burturbeining og flutning up á uml. **15.450 kr** fyri 300 stk. asbest ella eternit takplátur.

Ætlanin er at asbest/eternit skal latast inn í stórsekkjum sum fáast frá Brennistøðini.

Út frá miðalútreiðslunum fyri at burturbeina 10 tekjur frá sethúsum, kunnu vit áseta ein prís fyri at keypa ein stórsekk, har bæði fluttningur og tyrving av asbest/eternitt er íroknað prísin fyri stórsekkin. Ein stórsekkur kann í mesta lagi hava 50 stk av takplátum, og merkir hetta, at hvør sekkur kann kosta uml. **2.500 kr/stk u/mvg**.

Kommunan kemur ikki at hava fíggjarligan miss av nýggju skipanini.
Borgarin fær góðkent pakkitilfar, soleiðis at asbest ikki verður veitt út í náttúruna. Eisini sleppru borgarin undan at standa fyri flutninginum.

Málið skal í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Útsett.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við teirri broyting, at gjaldast skal eftir vekt, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

# 256/24 Tórshavnar havn : Umvæling av niðaru gongubreyt fram við Skálatrøð og Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 03.09.2024 | 26/24 | 24/07325-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.09.2024 | 213/24 | 24/07325-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2024 | 164/24 | 24/07325-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 256/24 | 24/07325-1 |

**Upprunin til málið**
Havnanevndarformaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Niðara gongubreytin fram við Skálatrøð og yvir í Vágsbotn er í ringum standi. Betongflísarnir eru eru illa farnir og leysir, og kunnu elva til vanda fyri fólk til gongu. Alt strekkið frá Rættará og yvir í Vágsbotn treingir til at verða umvælt ella gjørt av nýggjum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Niðara gongubreytin fram við Skálatrøð og yvir í Vágsbotn hoyrir sambært samskiftisavtalu millum Tórshavnar kommunu og Tórshavnar havn (J.Nr. 2005-0415/18) undir málsøkið Smábátahavnir.

Á íløgukarminum fyri smábátahavnir LK74999 er kr. 685.000 tøkar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1113 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 7476 | LK74999 | Smábáta-havnir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 7476 | | | x |

| **Upphædd** |
|---|
| Kr. 685.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:
- At játtaðar verða kr. 685.000 av íløgukarminum LK74999 til umvæling av niðaru gongubreytini fram við Skálatrøð og yvir í Vágsbotn.
- At umsitingin fyrireikar verkætlan fyri umvæling av gongubreytini innanfyri tøka játtan og innheintar tilboð upp á arbeiðið.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 03. september 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Um ætlanin er at fara undir dagføring av gonguleiðini framvið sjóvarmálanum, so er ynskiligt at fyrireikingin tekur hædd fyri heildarætlanini fyri bryggjukantin frá 2022. Víst verður til skjal nr. 24/07325-4, Bryggjukanturin Vágsbotnur_Skálatrøð.

Somuleiðis er týdningarmikið, at hædd verður tikin til standmyndina og listaverkið Nólsoyarpáll, sum fekk nýggja staðseting fram við bryggjukantinum í 2022. Víst verður til skjal nr. 24/07325-5, Skitsa Nólsoyar Páll og Bryggjukantur.

Væl skilligt er, at neyðugt er at gera ábøtur á gongubreytina/bryggjukantin, men tað er upplagt at gera økið í eini heild, soleiðis at ábøturnar, sum nú eru undir fyrireiking, taka hædd fyri framtíðar ætlanunum í økinum.

**Skjøl:**
24/07325-4, Bryggjukanturin Vágsbotnur_Skálatrøð
24/07325-5, Skitsa Nólsoyar Páll og Bryggjukantur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umvælingin og dagføringin av gongubreytini verður gjørd í tráð við tær framtíðarætlanir, sum fyriliggja fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1115 |
| | Formansins merki: |

## 257/24 LEKS Advokatfirma : Umsókn vegna Sp/f Festing um at endurnýggja leigusáttmála um grundøki til frystigoymslu á matr. 230r Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 10.10.2024 | 29/24 | 24/07780-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 264/24 | 24/07780-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 257/24 | 24/07780-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá LEKS Advokatfelag d.f. 9. september 2024 vegna Sp/F Festing.

**Lýsing av málinum**
LEKS Advokatfelag søkir vegna Sp/F Festing um at endurnýggja leigusáttmálan viðvíkjandi matr. 230r í Kollafirði, har Festing saman við Samskip rekur frystihotel.

Núverandi sáttmáli við Sp/F Festing er óuppsigiligur fram til 14/6-2025, og kann síðani sigast upp við 1 ára freist.

Sp/F Festing er í eini tilgongd har ið aktiv felagsins verða endurfíggjað, og í hesum sambandi hava fíggingarstovnarnir biðið Sp/f Festing um at søkja um endurnýggjan av leigusáttmálanum.

Í § 10 í verandi leigusáttmála er klausulur, sum gevur leigaranum rætt til at leingja leigusáttmálan, um inntøkurnar av vørugjaldið er omanfyri eina ávísa útroknaða upphædd. Felagið lýkur ikki hesa treyt í løtuni, tí virksemið seinastu tíðina hevur verið ov lítið. Tískil er neyðugt hjá felagnum um at søkja um at fáa leigusáttmálan endurnýggjaðan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 24/07780-1 : Sp/F Festing - Umsókn um endurnýggjan av leigusáttmála
J.nr. 24/07780-1 : Verandi leigusáttmála matr. 230r Kollafjørður
J.nr. 24/07780-3 : Uppskot til nýggjan leigusáttmála

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læHttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1116<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at endurnýggja leigusáttmálan við Sp/f Festing sambært uppskoti til nýggjan leigusáttmála, J.nr. 24/07780-3, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 10. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. oktober 2024 | Blað nr.: 1117<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

